# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



10. februar fingu Joan Poulsen úr Vági og Rasmus Frølund úr Keypmannahavn á Herlev sjúkrahúsi ein son sum vigaði 3300 gr. og var 53 cm. langur.

24. mars fingu Tanja og Fríðin Ziskason, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4400 gr.

31. mars fingu Durita Hansen og Niels Nolsøe Andreasen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3460 gr.

3. apríl fingu Maria og Viggo Johannesen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4260 gr.

4. apríl fingu Eyðgerð og Jógvan Kruse, Hósvík, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3300 gr.

5. apríl fingu Leika Samuelsen, Sørvágur og Páll Hansen, Miðvágur, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4350 gr.

**Brúdleyp**
Leygardagin 8. apríl kl. 12.00 giftast í Vesturkirkjuni Siri Òsá og Dan Sjóstein. Døgurði verður fyri innbodnum á Hotel Hafnia kl. 14.00. Vælkomst verður á Teigi 5, Tórshavn, eftir kl. 18.00.

Leygardagin 8. apríl giftast í Rødovre kirkju, Siri Hauritz úr Sumba og Tue Falkenstrøm úr Brønshøj. Brúdleypsadr.: Elektravej 7, 2610 Rødovre.

**80 ár**
Leygardagin 8. apríl verður Margit F. Durhuus, 80 ár. Dagurin verður hildin hjá Jóni og Sveu leygardagin kl. 18.30.

## Leygardagin 8. apríl verður Jenny Petersen áttati fimm ár

*Tað lotar úr Eysturskarði*
*um garðarnar, Onghamar*
*og Svarthamar. Tað skyggir*
*í gluggakarmi og á rygggásum*
*um tann víða fjørð*
*nú Jenny drotning*
*av Bakkanum*
*er eitt ár eldri enn í fjør.*

*Hetta er tín dagur -*
*ein áttatifimm ára løta,*
*sum livir við*
*tína hjartalund*
*í døgum, vikum ....*
*vár-, summar-,*
*heystar- og vetrarstund*

*Hetta var tín lívssproti*
*at vera ein fitt og vinarlig*
*koll'fjarðar - bakkakona,*
*á Ovara vegi -*
*hvørjum gerandisdegi -*
*so skemtingarsom og hugfarslig.*

Tøkk fyri
Hjartaliga til lukku

**Frits**

# Jan Joensen leiðari av »Brugsen i Terslev«

**Í sambandi við at 25 ára gamli føroyingurin Jan Joensen tók við sum leiðari av "Brugsen í Terslev" á Sælandi, nærhendis Vordinborg, var móttøka í handlinum fyri jól í fjør. Omman í Havn var inni á redaktiónini á Sosialinum við hesi heilsan frá sær og abbanum**



Jan er føddur í 1980 í Havn, er sonur Irenu og Arna Joensen, sum í 1986 fluttu inn til Kaldbak til teirra nýggja heim, sum tá bleiv liðugt. Ta fyrstu tíðina, til húsið bleiv liðugt, búðu tey hjá ommum og abbum í Havn og á Hvítanesi.

Jan og systkini vóru tey fyrstu børnini, sum fóru í nýggja vøggustovu/barnagarð í Hoyvík. Jan gekk í skúla í Kaldbak, fekk góðan karakter og var ein evnaligur drongur. Sum so mong onnur flutti familjan av landinum, niður til Danmarkar í 1993. Jan gekk so síni síðstu barnaár í skúla í Stege á Møn, síðan í hægri handilsskúla í Vordingborg, har hann so bleiv liðugur í 2002.

Sítt fyrsta starv fekk hann í »Super Brugsen« í Stege. Seinni fekk hann starv sum leiðari fyri frugt/grønt í Vordingborg, og síðan fór hann víðari til "Brugsen í Fakse". Men sum Jan sjálvur sigur í samrøðu eina lokala avís, er tað avbjóðingin, sum fekk hann at skifta starv á heysti 2005 til leiðara í "Brugsen í Terslev".

Hetta er ein heilsan til tín góði Jan. Hjartaliga tillukku og góða eydnu í framtíðini.

# Føroyingar vitjaðu á formansfundi í Oslo

**Fyri tveimum vikum síðan vitjaðu borgarstjórar og kommunustjórar úr KSF á árliga formansfundinum hjá Kommunusamskipanini í Norra á formansfundi í Oslo**

TÍÐINDASKRIV

Á árliga formansfundinum hjá Kommunusamskipanini í Norra, KS, luttóku eisini borgarstjórar og kommunustjórar frá KSF úr Føroyum. Í alt 12 luttakarar úr Klaksvík, Runavík, Fuglafirði, Vági og Tórshavn.

Fundurin var í Oslo, har umleið 400 fólk luttóku. Nógv aktuel mál vóru á skránni, har borgarstjórar úr øllum Norra høvdu møguleika at siga sína hjartans meining um nógv lands- og kommunumál.



*Statsministarin Jens Stoltenberg heilsar uppá Heðin Mortensen borgarstjóra*

Millum annað vóru útjavning, kommunusamanlegging, eldraøki, barnaansing og umhvørvismál á skránni. Hesi mál góvu eina góða ábending um støðuna, sum er í Norra í dag, og hvat ætlanin er at fremja í komandi tíðum.

Høvuðstalarin var sjálvur statsministarin Jens Stoltenberg. Hann lovaði meira pening til kommunurnar, men setti eisini størri krøv. Stjórnin hevði lagt linjunar, og skuldi hetta eydnast, mátti eitt størri samstarv verða millum stat og kommunu.

Hetta tóku flestu borgarstjórar í Norra undir við og sóu fram til stóra menning á kommunala økinum.

Undir fundinum nýtti Statsministarin Jens Stoltenberg høvi til at heilsa uppá sín partífelaga Heðin Mortensen, borgarstjóra í Tórshavn.

# Romantikkur í Miðlon

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin verdur veitsluhýrur í Miðlon. Tað eru 8 handlar sum í felag eru farnir undir at halda eina stóra felags brúðarveitslu á torginum.

Hetta er eitt tiltak, sum handlarnir eru farnir undir fyri at vísa hvussu ein brúðarveitsla kann haldast á allar besta hátt.

Luttakandi handlar eru: Brúðarlín við nýggjastu modellum av brúðarkjólum, Teir & Tara við øllum til brúðgómin og Fríðkan fer at seta brúðarhár allan dagin. Inspiratión luttekur við borðdekkan, gávuhugskotum og kunning um hvussu ein kann gera ein elektroniskan ynskilista. Orkis hevur borðprýði, brúðarbukettir og annað verður sýnt fram. Elding kemur við gávuhugskotum og Cafe A við leskiligum køkum.

Kl. 13 og 15 verður livetónleikur við Gunnar Guttesen á klaver og Kristoffur Mørkøre á bass. Væntað verður at nógv fólk fara at leita sær í Miðlon hendan leygardagin 8. apríl fyri at uppliva romantisku atmosferðina eina løtu. Opið verður frá kl. 10 til 17.



